# Vae victis – meðan kongressin svansar

# -Undirgrundin má ikki gleppa okkum av hondum



*-Vit kunnu geva dønum burturav, gamamí, og fyrr var illa, men vit mugu undir ongum umstøðum lata ognarrætt og avgerðarrætt okkara til føroysku undirgrundina gleppa okkum av hondum.*

*M.a. hetta skrivar Annfinnur í Skála, lærari í Hoydølum í fyrsta parti av greinarøð, sum er í trimum pørtum. Annar partur kemur í blaðið fríggjadagin, triðji leygardagin.*

*Annfinnur í Skála kemur í hesum fyrsta partinum inn á leiklutin hjá danska bankaeftirlitinum, sum hann setir eitt stórt spurnartekin við. Tað røkti ikki sína skyldu í 1952, tá Sjóvinnubankin fór á heysin og gjørdi tað heldur ikki í 1992, tá bankin aftur kollsigldi.*

***Inngangur***

Í fólkaræðisligum londum hevur fólkið sjálvt valt lóggávuvaldið (lóggávuting) og somuleiðis beinleiðis ella óbeinleiðis stjórnina (útinnandi vald), og tá hevur tað eyðsæð tað stýri, ið tað sjálvt vil hava, og sum tað hevur uppiborið, og tá ber illa til at mølma um karkagerðir. Í londum harafturímóti, ið ikki hava fólkaræði, hava fólk hug - og tað av røttum - antin at geva stýrinum ella øðrum skyldina, tí tey hava, ið hvussu er, onga skyld." *Gott strafe England,"* søgdu týskarar undir fyrra heimsbardaga, sjálvt um tað í roynd og veru var týska stjórnin sjálv, ið fyrst og fremst var atvoldin í, at kríggið brast á.

Mangt og hvat er farið fram her á landi, sum eg kundi hugsað mær, at fleiri enn eg halda vera løgið, og tí skrivi eg hesar viðmerkingar og tíverri eisini illigitingar, ið ikki, lat meg straks siga tað, sum tað er, byggja á ítøkiliga vitan, um tað, ið fram er farið, men soleiðis sum eg sum óvirkin áskoðari havi eygleitt hendingarnar. Eg haldi, at Føroya fólk hevur uppiborið at fingið at vitað, hvussu samráðingarnar fóru fram, hvat var havt á lofti í orðaskiftinum undir samráðingunum, og hvussu føroysku og donsku tingingarmenninir mettu støðuna leik fyri leik frá oktobur 1992 til oktobur 1993.



## *Viðmerkingar til og illgitingar um støðuna í dag*

1980'árini eru væl og virðiliga farin afturum, men nú í 1990'árunum hevur fallið verið ótamað, og vit brustu í helluna og liggja nú og grulva sansaleys millum stór og smá trotabúgv.

1980'árini fara ivaleyst at verða kannað, men tað, ið er farið fram frá oktobur 1992, og sum framvegis fer fram, hevur størri týdning beint nú, tí í løtuni snýr tað seg ikki um, hvussu vit komu í hesa vanlukku støðu, men hvussu vit sum frægast sleppa burtur úr henni aftur. Hvussu hevur so gongdin verið?

Sjálvandi bera teir, ið ráðu hava fyri borgum her á landi, høvuðsábyrgdina, tí teir gingu á odda og lorkaðu framtíð okkara burtur fyri løtuvinning. Men kann tað hin vegin hugsast, at vit øll, Føroya fólk, bara eru finnur í stórum leiki, har vit hvørki vistu ella vita, at talvið var avrátt frammanundan, og at vit vóru, ið hvussu er, ikki steðgað í at seta okkum sjálvi skák og mát?

*-Fýra ferðir eru kosnu menn okkara farnir tunga Kanossaferð (biddaragongu) til Keypmannahavnar. Var tað fyri neyðini? Ella var hetta eisini leikur, ið hevði til endamáls at eyðmýkja og bloyta samráðingarmenn okkara - og føroysku tjóðina? spyr Anfinnur í Skála*

***Danska bankaeftirlitið***

***6. oktobur 1992. Danir komu okkum til hjálpar***

Tá ið Sjóvinnubankin á sinni fór av knóranum í 1952, høvdu grannskoðarar bankans í nøkur ár - er mær

